## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av vestri og útnyrðingi og regn, seinni minni vindur og ælingur. Hitin millum 9 og 12 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Lot til andøvsgul av suðri og útsynningi og regn ella mjørki. Um kvøldið snarar hann í útnyrðing og ælingur. Hitin millum 8 og 11 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Lot til andøvsgul av ymsum ættum, seinni upp í ein strúk av útnyrðingi. Ælingur, partvís vátaslettingur og hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Leygardagin upp í strúk í vindi av norði og ælingur, partvís vátaslettiingur, men sunnudagin minni vindur av vestri og yvirhøvur turt. Hitin millum 3 og 7 stig.

# Bróstamjók ella ei

**Ofta verður tikið til, at vit hava fingið hatta ella hitt inn við móðurmjólkini. Hvussu er og ikki, so vórðu tey bæði, Jana og Jákup Oluf, fødd sama dag á Landssjúkrahúsinum, og síðani tá hava vegir teirra – av og á – tilvildarliga runnið saman**

TILVILD
*Rúna Sivertsen*



*Petrina Hansen í Vestmanna, t.v., og Helena Hansen í Hvalvík, áttu sama dag á Landssjúkrahúsinum fyri góðum 31 árum síðani. Her hugna tær sær saman við Janu og Jákup Olufi við køksborðið hjá Helenu í Hvalvík og minnast aftur á dagarnar á hospitalinum. Umframt fleiri stuttlig tilvildarlig treff síðani tá, so eru tær báðar nú ommur at trý ára gomlu dóttir Jákup Oluf*
*Mynd: Rúna Sivertsen*

Tey eru bæði fødd Hansen tann 5. oktober 1973 á Landssjúkrahúsinum. Síðani tann dagin hava vegir teirra fleiri ferðir tilvildarliga runnið saman.

Í dag eru tey svágd, tí Jákup Oluf er trúlovaður við systir Janu, og Jana er mostir at dóttir hansara.

Fyrstu ferð, tey hittust aftur, var tá bæði byrjaðu á Fiskivinnuskúlanum í senn. Síðani arbeiddu tey saman eitt skifti á kryvjivirkinum í Vestmanna.

Seinasta tilvildarliga hendingin var, tá tey stillaðu upp – bæði fyri fyrstu ferð – til kommunuvalið hesaferð. Tað eydnaðist báðum at verða vald, hon í Sunda kommunu, hann í Vestmanna. Og tá bygdaráðini vórðu skipað, vísti tað seg, at bæði vóru vald í trivnaðarnevndirnar.

Vit byrjaðu við bróstamjólkini. Tað var soleiðis, at Petrina, mamma Jákup Oluf, hevði nógva mjólk, men Helena, mamma Janu, hevði ikki ein dropa – so, um móðurmjólk ger nakran mun, tá tað kemur til politikk, tað má tíðin koma at vísa.

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷5 |
| Nuuk | ÷4 |
| Qaqortoq | – |
| Ammassalik | ÷8 |
| Saint John's | – |
| Halifax | – |
| Reykjavík | ÷3 |
| Seyðisfjørður | ÷1 |
| Tórshavn | 2 |
| Lerwick | 5 |
| Aberdeen | 12 |
| London | 13 |
| Tromsø | ÷5 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 0 |
| Keypmannah. | 6 |
| Helsinki | ÷2 |
| Moskva | ÷6 |
| Berlin | 3 |
| Warzawa | ÷3 |
| Kiev | ÷2 |
| Bukarest | 2 |
| Paris | 11 |
| Madrid | 8 |
| Róm | 11 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 13 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 19 |
| Beijing | 12 |
| New Dehli | – |
| Bangkok | 30 |
| Jakarta | 31 |
| Sydney | – |
| New York | 11 |
| Miami | 25 |
| Los Angeles | 14 |
| Meksikobýur | 19 |
| Panama | – |
| La Paz | – |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 28 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 981 hPa. vestan fyri Ísland stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 1002 hPa. vestan fyri Írland kemur móti Føroyum og dýpist.




Lágtrýstið yvir Norska Havinum fer eystureftir og brúgvalagið haðani til Føroya fer suðureftir og hevur kaldari luft við sær.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 22/11 kl. 06⁰⁰–23/11. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 2,3°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° - Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: <0,1 mm – mált frá 22/11 kl. 06⁰⁰–23/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 108,1 mm

RADIOHANDILIN
v. Persson & Persson
Landsins bestu parabolskipanir



· Søla og tænasta
· Verkstaður
· Antennu- og parabolmontering
· Útleigan

N. FINSENSGØTA 16 · TEL 31 82 77
e-mail: radioep@post.olivant.fo

## VESTFALLSKYRRINDI

14. november: Mánin næstur jørðini
19. november: Fyrra kvarter
26. november: Fullmáni
30. november: Mánin longst frá jørðini

Kelda: Álmanakkin 2004

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 24. nov | 04.24 | 16.46 | 03.24 | 15.46 | 03.39 | 16.01 | 06.24 | 18.46 | 07.24 | 19.46 | 02.39 | 15.01 | 01.39 | 14.01 | 04.39 | 17.01 | 05.39 | 18.01 | 04.09 | 16.31 | 05.24 | 17.46 |
| 25. nov | 05.06 | 17.28 | 04.06 | 16.28 | 04.21 | 16.43 | 07.06 | 19.28 | 08.06 | 20.28 | 03.21 | 15.43 | 02.21 | 14.43 | 05.21 | 17.43 | 06.21 | 18.43 | 04.51 | 17.13 | 06.06 | 18.28 |
| 26. nov | 05.50 | 18.12 | 04.50 | 17.12 | 05.05 | 17.27 | 07.50 | 20.12 | 08.50 | 21.12 | 04.05 | 16.27 | 03.05 | 15.27 | 06.05 | 18.27 | 07.05 | 19.27 | 05.35 | 17.57 | 06.50 | 19.12 |
| 27. nov | 06.35 | 18.59 | 05.35 | 17.59 | 05.50 | 18.14 | 08.35 | 20.59 | 09.35 | 21.59 | 04.50 | 17.14 | 03.50 | 16.14 | 06.50 | 19.14 | 07.50 | 20.14 | 06.20 | 18.44 | 07.35 | 19.59 |

5 707265 100036 >